# r gøtur gloymt




**GÓÐVEÐUR**

*Úti í garðinum dámar teimum eldru væl at verða. Í góðveðrinum mikudagin fóru starvsfólk og húsfólk út í garð við breyði í hond, at geva hønunum - og eisini tí mungandi hundinum - fransbreyð*

## Heilsu-røktarin í fokus

Almanna- og heilsu-røktarafelagið og Føroya Psykiatrifelag skipa fyri almennum panel-fundi í Miðlahúsinum mánakvøldið 16. mai kl.19.

Endamálið er at fáa at vita, "hvussu heilsu-røktarin verður brúktur á arbeiðsmarkaðinum í dag".

Panelluttakarar: Helena D. á Neystabø, lands-stýriskvinna í menta-málum, Mary í Garði, stjóri í Nærverkinum, Rósa Samuelsen, lands-stýriskvinna í almanna-málum og Naina Túgvustein, varastjóri á Landssjúkrahúsinum. Orðstýrari verður Rigmor Dam.

Hetta kvøldið verður lagt upp til kjak og dialog um okkara leiklut á arbeiðsmarknaðinum, har luttakarin fær kunn-leika um førleikarnar og kvalitetin hjá heilsu-røktarum.

– Heilsurøktarar vilja fegnir samstarva við allar starvsfólkabólkar í almanna- og heilsuverk-inum.

– Tí vilja vit bjóða leiðsl-um og øðrum sam-starvsfeløgum, so sum sjúkrarøktarfrøðingum, pedagogum, ergo- og fysioterapeutum, heilsu-hjálparum, ljósmøðrum, lærarum og læknum at koma til hetta tiltakið, siga feløgini í innbjóðing síni til fundin.